# ÍNA TALENT



## TRÚGVUR

*87 ára gamli Edvin Thomasen soleiðis sum mong kenna hanna - við eitt orgul. – Eg havi bara ynskt at tæna Harranum við mínari talent, sigur hann lítillátin. Umframt virksemi innan tað andaliga, hevur Edvin eisini arbeitt hjá handilsvirkinum N. Niclasen í Sørvági og hjá Landsverkfrøðinginum. Edvin arbeiddi har til hann fylti 70 ár.*

*Mynd: Torfinn Jacobsen, Trúboðin*

## PAUSA

Hóast teir ídnu sangararnir neyvan ynsktu tað, so er tað kortini ein veruleiki at Streingjakórið í Vágum ikki venur longur.

Kórið hevur ikki vant í eitt ár ella so, men vónað verður at tað kann byrja aftur nakað skjótt.

## Einki uttan Edvin

*Eileen Hansen hevur verið í Streingjakórinum frá byrjan, og hevur verið kórleiðari í mong ár.*
*– Eg minnist sera væl ta fyrstu ferðina, vit sungu. Tað var í Miðvági, og fyrsti sangurin var 'O, Jesus lat upp míni eygu', greiðir hon frá.*
*Eileen letur væl at samstarvinum við Edvin.*
*– Hann hevur verið ótrúliga trúgvur at møta upp. Hvørt kvøld, vit hava vant er hann komin at spæla. Og tá hann onkra hendinga ferð hevur verið sjúkur, ja, so steðgar alt upp hjá okkum.*
*– Vit kunnu ikki vera hann fyri uttan, sigur hon.*